Rúni og Rókur:

# Brøður við buldur og brak

**– Vit høvdu eina koyggjusong, og har var tað »først til mølle«-prinsippið, ið varð galdandi. Tað vil siga, at tann, ið fór í song fyrst, slapp at sova ovast, um hann ikki varð togaður niðuraftur, sigur Rókur Jakobsen. Vit hava hitt hann og beiggjan Rúna Jákupsson til eitt prát um brøðralag, leikutoy og um at verða forkelaður**



*– Sum yngri helt eg, at Rúni var ein óndur stóribeiggi. Og eg var eisini bangin fyri honum og vinmonnunum, tí teir vóru so stórir, sigur Rókur Jakobsen um stórabeiggja sín, Rúna Jákupsson*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

SAMRØÐA
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Røddirnar eru kendar. Báðar tvær. Seinastu sumrini hevur onnur teirra verið at hoyrt regluliga í Útvarpi Føroya, meðan hin hevur verið at hoyrt á ólavsøkukonsertini.

Rúni Jákupsson og Rókur Jakobsen eru brøður. Teir hava seinastu árini verið ein partur av sumrinum hjá mongum føroyingi. Rúni í útvarpssendingini Barometrið og Rókur við ymsum tónleikabólkum á ólavsøkukonsertini.

### Forkelaðir

Tað eru fimm ár millum brøðurnar báðar.

– Eg minnist ikki heilt, tá Rókur varð føddur, men eg kann minnast, at tá var eg ikki einsamallur á borgini longur, sigur Rúni.

Teir viðganga, at teir hava klandrast nakað illa. Um alt.

– Nú eru tað fimm ár á muni, so tað var ikki beinleiðis leikutoy, vit klandraðust um, heldur Rókur, og Rúni leggur afturat:

– Fimm ár eru nakað nógv, so Rókur koyrdi á skateboard, tá eg spældi fótbólt.

Brøðurnir báðir ásanna, at teir eru vorðnir forkelaðir. Bæði sum børn og nú sum vaksnir.

– Heima var onki hjá okkum at hugsa um. Alt varð ornað av sær sjálvum, og tá vit nú eru heima, so er tað mestsum soleiðis enn, siga teir.

Báðir eru nú fluttir heimanifrá. Rókur nemur sær útbúgving í Danmark, meðan Rúni starvast í Útvarpi Føroya.

### Tann listarligi

Ikki slepst undan, at teir báðir líkjast í útsjónd. Og heldur ikki er heilt frítt, at báðir hava hug at vera eitt sindur lítillætnir.

Spurdir um, hvør teirra er meira listarligur, heldur Rúni beinanvegin fyri, at tað man vera Rókur. Men hann ristir beinanvegin við høvdinum.

– Jú, tá tað kemur til tónleik, so er Rókur heilt vist tann listarligi.

– Men viðvíkjandi handalagi, so er Rúni betri fyri. Eg fekk altíð dumpikarakter í røkjuskapi, sigur Rókur.

– Rókur torir meira enn eg. Eg hevði aldri stillað meg uppá ein pall at sungið, so í so máta er hann meira framligur enn eg, heldur Rúni fyri.

### Smædnir

Báðir tveir siga seg vera smædnar.

– Vit eru trý systkin, og vit eru øll smæðin. Pápi okkara hevur tað fyri at halda røður og fortelja krønikur, men liggur ikki ordiliga til okkara, greiða teir frá. Rókur leggur afturat, at tað kanska ikki hóskar so væl saman at vera smæðin og sangari.

Sum flestu systkin hava gjørt fyrr ella seinni, so hava Rúni og Rókur eisini deilt kamar. Og tað var ikki bara bara.

– Vit høvdu eina koyggjusong. Og har var tað »først til mølle...« prinsippið, ið varð galdandi. Tað vil siga, at tann, ið fór í song fyrst, slapp at sova ovast, um hann ikki varð togaður niðuraftur. Tá eg sigi »hann«, so meini eg við meg, greiðir Rókur flennandi frá. Hann leggur afturat, at onkuntíð fekk hann via foreldrini loyvi at sova á ovastu rók.

Tað var eisini stóribeiggin, sum vanliga fekk skyldina fyri alt.

– Eg skal ásanna, at eg kanska var skjótur at fara at gráta og renna til mammu, tá eg var yngri. Og tá var tað Rúni, sum fekk skyldina, sigur Rókur, meðan hann skeitir yvir á Rúna, sum nikkar samtykkjandi, og sigur, at soleiðis upplivdi hann tað eisini.

### Mangt broytist

Spurdur um, hvussu teir báðir sóu hvønn annan, sum ávíkavist stóri- og lítlibeiggi, sigur Rókur:

– Sum yngri helt eg, at Rúni var ein óndur stóribeiggi. Og eg var eisini bangin fyri honum og vinmonnunum, tí teir vóru so stórir. Men nú sum eldri síggi eg øðrvísi uppá tað. Eg havi adopterað nógvar vanar frá Rúna.

Hann leggur afturat, at Rúni átti nógvar plátur og plagdi eisini viðhvørt at vera plátuvendari.

– Tað var ein fragd at spæla við pláturnar hjá Rúna, meðan hann var úti. Har vóru nógv nøvn at lurta eftir, og nøkrum av teimum lurti eg eftir enn.

Sum 13-14 ára gamlir, gjørdu Rókur og Hallur um seg við bólkinum Lokum.

– Rókur gjørdi um seg sum ungur tannáringur á 15 teimum bestu. Tað var nokkso stuttligt, heldur Rúni. Hann heldur fram, at fyrr plagdi Rókur eisini, at fáa nakað av fan-brøvum.

– Men tann tíðin er farin, leggur Rókur afturat.

### Gamlir dagar

Tá teir verða spurdir um onkra stuttliga hending, sum teir minnast aftur á, gerst verri.

Men eftir at hava hugsað seg um eina løtu, ber betri til.

– Vit vóru roadtrip í Íslandi, og beint sum vit koyrdi mitt ongastaðni, skuldi Rúni út at pissa. Hann fór út og afturum ein stein, men kom skjótt rennandi undan aftur við einum ravni aftaná sær, greiðir Rókur frá. Stóribeiggin er tó kvikur at rætta hann og sigur, at tað var ikki ein ravnur, men ein heykur, ið hann hevði flúgvandi yvir sær.

Hendingin Rúni kemur á er ikki so heilt gomul. Hon er frá valdegnum 1998.

– Valið 1998, tá tað var tann stóra toganin millum loysing/samband. Rókur og nakrir vinmenn høvdu gjørt av at fara at tjalda á Hoyvíkstjørn. Teir róu út í gummibáti og høvdu eina stóra plakat, har tað stóð »Vit loysa!« á. Tað var orginalt, men ótrúliga løgið, heldur Rúni.

Men hvussu er ella ikki, so eru og verða teir báðir brøður. Og tær báðar kendu røddirnar verða ivaleyst at hoyra framhaldandi í summar. Rúni í útvarpinum, og man Rókur ikki standa á onkrum palli um ólavsøkumundið?





## Rúni um Rók

1. Yndismáltíð?
   Rúni: Kjøtbollar í karry
   Rókur: Lambskjøt

2. Hvat etur hann als ikki?
   Rúni: Ræstan fisk
   Rókur: Seyðarhøvd

3. Hvad dámar Róki best við síni útsjónd?
   Rúni: Tað má verða búkvøddarnir (eggjabakkarnir)
   Rókur: Eyguni

4. Hvat dámar honum als ikki?
   Rúni: Hann heldur seg vera nakað klæntrasligan
   Rókur: Oyruni

5. Um Rókur skuldi keypt ein málning av einum føroyskum listarfólki. Hvønn hevði hann valt?
   Rúni: Mikines
   Rókur: Mikines

6. Er tað nakað, ið Rókur ræðist?
   Rúni: Hann ræðist eiturkoppar
   Rókur: Hæddir

7. Um vit ímynda okkum, at húsini standa í ljósum loga, og Rókur kundi bjargað eini fløgu/plátu úr síni samling. Hvørja hevði hann tikið?
   Rúni: Jeff Buckley – Grace
   Rókur: Jeff Buckley - Grace



## Rókur um Rúna

1. Yndismáltíð?
   Rókur: Pizza
   Rúni: Ræst kjøt

2. Hvat etur hann als ikki?
   Rókur: Seyðarhøvd
   Rúni: Medistarpylsu

3. Hvad dámar Rúna best við síni útsjónd?
   Rókur: Eyguni
   Rúni: Kjálkarnar

4. Hvat dámar honum als ikki?
   Rókur: Oyruni
   Rúni: Eg haldi meg vera nakað klæntrasligan

5. Um Rúni skuldi keypt ein málning av einum føroyskum listarfólki. Hvønn hevði hann valt?
   Rókur: Anker Eli Petersen
   Rúni: Mikines

6. Er tað nakað, ið Rúni ræðist?
   Rókur: Hæddir
   Rúni: Tannlæknar

7. Um vit ímynda okkum, at húsini standa í ljósum loga, og Rúni kundi bjargað eini fløgu/plátu úr síni samling. Hvørja hevði hann tikið?
   Rókur: Queensryche – Empire
   Rúni: Queensryche – Promised Land





